## Ronaldo á vøllin fyri AC Milan

Brasilski álopsspælarin Ronaldo spældi fyri fyrstu ferð fyri AC Milan um vikuskiftið. Ronaldo skifti í januar mánaði frá Real Madrid til AC Milan at spæla. Sunnudagin sat Ronaldo á beinkinum, tá ið AC Milan spældi ímóti Livorno. Í hálvleikinum var støðan 1-1, men í seinna hálvleiki gjørdi Marek Jankulowski sigursmálið hjá Milan. Ronaldo kom á vøllin, tá ið ein hálvur tími var eftir at spæla, men hann skoraði ikki í fyrstu royndini.

## Andrew gjørdi tvey mál



Andrew av Fløtum gjørdi rættiliga vart við seg í venjingardysti hjá Fremad Amager um vikuskiftið. Fremad Amager spældi ímóti næstbesta liðnum hjá FCK, og liðið av Amager vann dystin 3-1. FCK kom á odda 1-0, men so skoraði Fremad Amager tríggjar ferðir. Andrew av Fløtum spældi í álopinum, og hann javnaði til 1-1, áðrenn hann so skoraði til 2-1. Tá ið støðan var blivin 3-1, var Andrew skiftur út.

# ið





*Og so kundu strandingar enn eina ferð fara eftir steypinum. Hetta er fjórða árið á rað – og sættðu ferð í sjey ár - at steypið endar á Skála*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Men so nógv tann fremsta av hesum er uttan diskussión sálarligi parturin av spælinum.

Vestmenningar høvdu sigurin so nær, at teir mest sum kundi nerta við hann. Kendu helst eisini rómin av steypinum, sum stóð hálvan metur frá miðlinjuni. Arbeiðið skuldi bara gerast liðugt, áðrenn gongan kundi fara móti bankastjóranum, sum skuldi handa steypið.

Men so gekk alt galið. Bæði millum spælarar og venjara tóktist panikkurin brádliga at breiða seg. Hugtakið frá Willy Raillo um at tora at vinna, gjørdist meira aktuelt enn nakrantíð, tá spælarar ferð eftir ferð framdu mistøk í álopspartinum. Antin við at fremja reguler teknisk mistøk, ella við at skjóta, langt áðrenn hetta var neyðugt.

Og tað gjørdi tað neyvan lættari, at bonkurin nú var farin í holt við eina støðuga útskifting av fólki. Ein útskifting, sum bar við sær, at álopsketan neyvan var tann sama tvey álop á rað.

Ikki minst á áskoðaraplássunum tóktist sálarfrøðin gera um seg. Tí hóast VÍF enn var framman fyri á talvuni, so var stórur munur á decibel-talinum, sum mál frá báðum liðunum høvdu við sær. Takið á høllini nærum lyftist uppfrá, hvørja ferð StÍF sendi bóltin í kassan, meðan talan hjá VÍF meira tóktist um eitt djúpt suff, tá teirra menn skoraðu.

### Steypaliðið av øllum

At Marian nú eisini fór at sveiggja seg upp, gjørdi ikki støðuna betri. Største kynstrið hjá einum góðum spælara er aloftast, at hesin er góður, júst tá tørvurin er størstur. Og í so máta mundi Marian hava eitt innbygt stoppur við sær hendan dagin. Varð stórspælið togað fram bara ein minutt seinni, kundi endin av dystinum væl verið ein heilt annar,

Einasti spælarin hjá VÍF, sum ikki tóktist hava trupulleikar av málverjanum, var Regin Joensen, men tá hann í fleiri førum varð hildin á beinkinum, hvarv tann hóttanin eisini.

Ístaðin varð álitið sett á skotroyndir útifrá, men vórðu hesar ikki blokkaðar av stórspælandi Borgar Danielsen í verjuni, tóktist Marian hava tamarhald á teimum flestu, og tað var eisini bjargingin hjá StÍF.

Tí heldur ikki teir spældu uttan mistøk seinastu løtuna. Bara góðan minutt fyri dystarlok, vildi Finnur Hansson avgera alt sjálvur, men forkølaða skotroyndin gav VÍF góða tíð til sítt álop. Her framdi Áki Olsen tó sama mistak, og so kundu strandingar fara í sítt seinasta álop. Har gjørdist Sveinur Justinussen í besta H.C. Andersen-stíli hetjan, tá hann sendi seinasta bóltin í kassan, og so kundi Marian enn einaferð sveiggja seg upp, tá hann fekk fótin á seinastu skotroyndina frá Áka Olsen. Og so var sigurin heima, og strandingar vistu tað.

### Hondbólturin vann

Seinasta bjargingin fekk spælararnar at tysja inn í málteigin, áðrenn seinastu sekundini vóru runnin av klokkuni. Kanska kundu dómararnir eisini valt at tveita onkran spælara út og geva VÍF eitt seinasta tríggja-metra kast, tá bólturin varð tikin frá Marian, meðan tvey sekund enn vóru eftir á klokkuni, men svørtklæddu menninir, sum komu væl frá uppgávuni, dugdu eisini at hava fingurin á pulsinum, soleiðis at hondbólturin kundi vinna á paragraff-ryttarínum. Nakað sum føroyskur hondbóltur kanska hevur saknað seinastu tíðina.